527-0008/2002/31

Pr 030703 til HH

Kapittul 1
Virkisøki

§ **1**. Uttan loyvi frá Føroya Landfúta er bannað at innflyta, útflyta, útvega sær, hava, eiga, bera ella brúka

1. skotvápn og pípur, lás, baskylur[1] og húsar at taka av til,
2. lóður til skotvápn, harundir eisini patrónhylki, tendriproppar[2]?, perlur, brandrør og projektil[3],
3. brókarboga og sleingibyrsu
4. signalvápn[4] og gas– og signalvápn í einum,
5. ljóðdoyvarar at nýta til skotvápn,
6. pipardósir[5],
7. optisk, elektronisk siktiamboð við ljósstrálu ella við elektroniskum ljósstyrkjara- ella infrareyðum amboði, sum kunnu nýtast til skotvápn ella brókarboga,

Stk. 2. Uttan loyvi frá landsstýrismanninum ella einum, sum hann hevur latið heimildina, er bannað at innflyta, útflyta, útvega sær, hava, eiga, bera ella brúka

1. handgranatir, bumbur, rakettvápn, minur og líknandi vápn, sum ganga av við bresti ella spræna smáflindur,
2. handgranatir, bumbur, rakettvápn, patrónir og líknandi sum vápn ella sum lóður, ið hava ísær ella eru ætlað at hava í sær fast tilfar, flótandi evni ella luftevni, sum við spreinging elva skaða, virka doyvandi ella ørkymlandi, og lutir til tílík vápn ella lóðurevni, og evni at fáa tey at ganga av, tó ikki pipardósir.

Stk. 3. Uttan loyvi frá landsstýrismanninum er bannað, at gera, framleiða ella tilevna amboð og tilfar sum tilskilað í stk. 1 og 2.

Stk. 4. Bannað er at innflyta, útflyta, gera, framleiða, tilevna, útvega sær, hava, eiga, bera ella brúka

1. evnafrøðilig vápn ella
2. geislavápn, sum serliga eru ætlað at blinda óvard eygu varandi.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann banna at útflyta vápn og lóður yvirhøvur.

§ **2.** Undantikin frá forboðunum í § 1 eru:

1. luft- og fjaðrabyrsur, tó ikki tær í § 1, stk. 1, nr. 3 nevndu, og lóður til hesar,
2. stikkpatrónir ikki størri enn kalibur 4,5 mm og lóður til, eru kúla/projektil[6] og patrónlongd ikki yvir 12 mm,
3. sláturamboð, sum bert kunnu nýtast til sláturs og lóður, sum bert kann nýtast til teirra,
4. framløðingar, sum eru framleiddir áðrenn 1870,
5. bakløðaravápn[7], sum eru framleidd áðrenn 1870, og sum eindarpatrónir[8] ikki kunnu nýtast til.

Stk. 2. Persónum undir 18 ár er ikki loyvt at flyta inn, útvega sær, hava inni ella ganga við teimum í stk. 1, nr. 1-5 nevndu vápnum v.m. Loyvt er heldur ikki at handa ella geva persónum undir 18 ár í stk. 1-5 nevndu lutir.

Stk. 3. Í sambandi við tiltøk er tó loyvt persónum, ið eru fyltir 15 ár at nýta luft- og fjaðrabyrsu, treytað av at tiltakið er skipað undir tryggiligum og fullgóðum umstøðum, at myndigur persónur yvir 23 ár hevur ábyrgdina, og at politiið hevur góðkent tiltakið og viðkomandi persón.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann áseta at forboðið í § 1 nr 3 kann fevna onnur luft- og fjaðravápn.

§ **3.** Har sum atgongt er hjá almenninginum, er bannað at bera knív, slíðraknív ella annað sting– og skerivápn, sum kann nýtast sum vápn móti lívi og heilsu. Hetta er ikki galdandi, um endamálið er rímiligt, í samsvari við

---

[1] Orðafrágr í serst viðm
[2] Frægari orð finnast fyri danska "tændskruer"
[3] Finst føroyskt orð?
[4] do
[5] Orðafrágr. í serst. viðm.
[6] do
[7] do
[8] Orðafrágr. í serst. viðm.

uppgávu og tørv hjá honum, ið ber tað, og umstøðurnar annars tala fyri hesum. Forboðið fevnir ikki um felliknívar, er blaðið ikki longri enn 8,5 cm.

Stk. 2. Uttan loyvi frá Føroya Landfúta er bannað at innflyta, útflyta, útvega sær, hava, eiga, bera ella brúka

1. hvøss vápn ella stingvápn, er blaðið longri enn 12 cm,
2. knívar við tvørstillaðum haldi at nýta til stoyt (push daggers),
3. støkkknívar og støkkstilettir,
4. "fald"knívar og "fald"stilettir[9],
5. felliknívar at nýta við einari hond (hurtigtræksknive) og felliknívar við tvískefti, har til ber at reisa blaðið einari hond (butterflyknívar),
6. korðustav ella onnur tílík goymd vápn,
7. slag- ella stoytvápn, harundir knúgvajørn, totenschläger[10], gummilurkar o.t. vápn,
8. vápn, ið virka lemjandi, doyvandi ella blindandi við ravnmagnsúrløðing,
9. kastistjørnur, kastiknívar og tílík vápn,
10. sirmdósir at nýta til sjálvverju, herundir táragasampullir, - sirmdósir og –patrónir,

Stk. 3. Loyvt er bert at útflýggja, geva ella lata øðrum, sum kunnu skjalprógva at hava neyðugt loyvi frá fútanum, vápn ella lutir, sum eru nevndir í stk. 2.

Stk. 4. Hóast ásetingina í stk. 2, nr. 1 krevst í sambandi við yrki, grindadráp, veiðu, stuttleikafiskarí, ítróttarkaving ella í húsarhaldinum ikki loyvi til at brúka og innflyta knívar og slíðraknívar við longri blaði enn 12 cm, eru teir gjørdir til endamálið. Loyvt er eisini at útvega sær, hava, eiga og bera hesar knívar og slíðraknívar til hesi endamál. Loyvt er somuleiðis at útflýggja ella lata øðrum hesar knívar, um so er, at viðkomandi bert ætlar at teir til hesi endamál. Sama er galdandi fyri váp, sum eru nevnd í stk. 2, nr. 7, verða tey nýtt í sambandi við veiðu ella stuttleikafiskarí.

§ 4. Loyvt er bert at útflýggja, geva ella lata persónum, sum kunnu skjalpróva at vera fyltir 18 ár og sum hava neyðug loyvi, vápn ella lutir, sum nevnd í § 1. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Stk. 2. Tey sum eru fylt 16 ár, kunnu tó brúka høglbyrsu, tá vaksin fólk, ið hava royndir í at handfara og nýta høglbyrsu, hava umsjón við teimum. Tey sum eru fylt 16 ár, kunnu nýta seyðabyrsu.

Stk. 3. Fær ein vápnið ella vápnalutin við arvi, kann Føroya Landfúti geva undantaksloyvi frá aldursásetingunum til at eiga lutin.

Stk. 4. Loyvt er at endurnýggja byrsupípu ella lutir til lás o. t. við umvæling, hóast ásetingarnar í stk. 1-3.

§ 5. Føroya Landfúti skal góðkenna, hvar ein skotvøllur skal liggja, og hvussu hann skal vera gjørdur.

§ 6. Lands- og ríkis myndugleikar, sum í virki sínum tørva vápn og lutir, sum nevnd í eru í § 1, stk. 1, nr. 1 og 2, eru ikki fevndir av ásetingunum í lógini.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvørjir hesir myndugleikar eru.

Kapittul 2
Serligar treytir

§ 7. Persónar, ið søkja um loyvi til slættpípaða høglbyrsu eftir hesi lóg, skulu saman við umsóknini leggja váttan frá tveimum myndugum persónum, ið hava royndir í at handfara og nýta høglbyrsu. Hesir persónar skulu taka ábyrgd fyri, at umsøkjarin

1. hevur gjøgnumgingið grundreglurnar um at handfara vápn saman við teimum,
2. hevur fingið upplæring í vápnabrúki saman við teimum og
3. er álitandi og skikkaður at fáa vápnaloyvi.

[9] Finna fø. orð
[10] Orðafrágr í serst viðm

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um skjalprógv og roynd í vápnabrúki, handfaring og skjóting fyri persónar, ið annars søkja um loyvi til at eiga, bera ella at brúka vápn sambært § 1, stk. 1 og 2.

§ 8. Føroya Landfúti kann geva loyvi til at reka handilsvirksemi við vápnum, lóðuri og meira. Loyvið er treytað av, at

1. viðkomandi annars lýkur treytirnar fyri at reka handilsvirksemi,
2. hann og tey, ið starvast hjá honum í hesum sambandi, hava neyðugan serkunnleika til vápn og vápnavirksemi,
3. til ber at goyma vápn, lóður og meira undir tryggum umstøðum,
4. og tað annars eftir eini ítøkiligari meting, verður hildið ráðiligt at geva loyvi.

Stk. 2. Í loyvinum verður ásett slag og nøgd av vápnum, lóðuri og meira, ið loyvið fevnir um, og hvussu hesi skulu verða goymd. Harumframt kann Føroya Landfúti geva loyvi til umvælingar og tænastu sum liður í vinnuvirkseminum við vápnum, eru treytirnar í stk. 1, nr. 1-4 loknar.

Stk. 3. Er umsøkjarin ein løgfrøðiligur persónur, skal leiðarin/stjórin lúka treytirnar í stk. 1, nr. 1-4.

Stk. 4. Loyvi sambært hesi grein galda í 5 ár.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um handilsvirksemi við vápnum.

§ 9. Tann, ið rekur handilsvirksemi við vápnum hevur skyldu til at skráseta øll vápn, lóður og meira, ið krevja loyvi, og sum verða seld, keypt og umvæld. Skrásetingin fer fram í eini serligari vápnabók, ið Føroya Landfúti hevur góðkent. Skrásetingin skal fevna upplýsingar um nummarið á loyvinum, skal vísa til slag, merki, modell, kalibur og skrásetingarnummar (fabrikationsnummar ella identifikationsnummar) á vápninum og nøgd av lóðuri. Føroya Landfúti kann krevja at fáa bókina og onnur neyðug skjøl í hesum sambandi útflýggjað.

Stk. 2. Vápnabókin skal goymast í minsta lagi 5 ár. Tað er eisini galdandi, hóast viðkomandi ikki longur rekur handilsvirksemi við vápnum.

Stk. 3. Tann, ið rekur handilsvirksemi við vápnum hevur skyldu til hvørja ferð at boða Føroya Landfúta frá teimum upplýsingum, ið verða skrásettir í vápnabókini. Fráboðanarskyldan fevnir ikki um høglpatrónir.

Kapittul 3
Goymsluhættir og flutningur

§ 10. Tann, ið eigur, ber ella brúkar vápn, lóður og meira, sum er nevnt í § 1, stk. 1 og stk. 2, hevur skyldu til at ansa eftir og hava eftirlit við, at óviðkomandi ikki sleppa framat hesum.

Stk. 2. Tá vápnið ikki verður nýtt, skal tað goymast í trygdarskápi/vápnaskápi ella á líka tryggan hátt. Lóður til skotvápn skal goymast undir lási ella á líka tryggan hátt, og ikki í sama rúmi sum skotvápnið, uttan so at skotvápn og lóður hvørt í sínum lagi verða goymd í trygdarskápi/vápnaskápi.

Stk. 3. Tá skotvápn ella lóður, sum nevnd eru í § 1, stk. 1, nr. 1 og 2 verða flutt úr staði í stað, skal tað vera goymt tryggiliga, og skulu neyðug fyrivarni verða tikin, so at óviðkomandi ikki sleppa framat. Vápnið skal ikki vera løtt, og um tað ikki er til óneyðugan ampa, verða tikið sundur og niðurpakkað.

Kapittul 4
Loyvi o.a.

§ 11. Loyvi eftir hesi lóg og kunngerðum við heimild í hesi lóg verða bert latin persónum, hvørs persónligu viðurskifti og atburður eru í lagi, og um ikki upplýsingar fyriliggja, ið gera tað ivasamt at geva loyvi.

Stk. 2. Løgfrøðiligir persónar kunnu fáa tey loyvi, ið nevnd eru í stk. 1, um tann ella tey, ið hava ábyrgdina og tann ella tey, ið skulu nýta vápnið, lúka treytirnar í stk. 1.

Stk. 3. Loyvi og góðkenningar, ið eru givin eftir hesi lóg og kunngerðum við heimild í hesi lóg, kunnu altíð verða tikin aftur.

§ 12. Umsókn um loyvi at innflyta, útflyta, útvega sær, hava, eiga, bera ella brúka vápn, lóður og meira, sum tilskilað í § 1, stk. 1, verður send landfútanum um politiið, har sum umsøkjarin býr ella røkir vinnu.
Stk. 2. Umsókn um at innflyta, útflyta, útvega sær, hava, eiga, bera ella brúka vápn og lutir, sum nevndir eru í § 1, stk. 2 og loyvi til at gera vápn, sum tilskilað í § 1, stk. 3, verður send Føroya Landfúta um politiið, har umsøkjarin býr ella røkir vinnu. Føroya Landfúti sendir landsstýrismanninum umsóknina til avgerðar, saman við viðmæli sínum.
Stk. 3. Umsóknin skal tilskila, hvat slag av vápni, lóðuri ella tilfari, talan er er um, og hvussu ætlanin er at nýta tey.

§ 13. Fyri loyvi givið eftir hesi lóg verður goldið kr. XX.
Stk. 2. Fyri loyvi til umsøkjara, ið frammanundan hevur eitt loyvi, ið fult gjald er goldið fyri, verður helvtin goldin.
Stk. 3. Onki gjald verður álagt fyri loyvi eftir §19.

§ 14. Gildistíðin fyri loyvi givin eftir hesi lóg ella kunngerðum við heimild í hesi lóg er 5 ár.
Stk. 2. Loyvi til høglbyrsu er ikki tíðaravmarkað.

§ 15. Føroya Landfúti hevur, móti at vísa skjalprógv, altíð atgongd til uttan rættarúrskurð at hava eftirlit við

1. vápnasøvnum
2. vápnagoymslum og vápnabókum hjá vápnahandilsmonnum
3. hølum, har skjótifeløg goyma vápn
4. skotvallum.

§ 16. Avgerðir, sum Føroya Landfúti hevur tikið sambært hesi lóg ella reglum við heimild í hesi lóg, kunnu kærast til Løgmálaráðið innan 4 vikur eftir, at avgerðin er tikin.

Kapittul 5
Revsireglur og gildiskoma

Revsireglur

§ 17. Brot á §§ 1-4, §§ 8 -10 í hesi lóg kunnu revsast við bót ella hefti, ella undir herðandi umstøður við fongsli upp í 2 ár.
Stk. 2. Fyri brot á reglur, ásettar við heimild í hesi lóg, kann verða ásett, at brot á reglurnar kunnu revsast við bót ella hefti, ella undir herðandi umstøður við fongsli upp í 2 ár.
Stk. 3. Fyri brot, sum løgfrøðiligir persónar, sum t.d. partafeløg ella lutafeløg fremja, kann tann løgfrøðiligi persónurin verða sektaður sum slíkur.
Stk. 4. Hava land, kommuna ella kommuufelagsskapur framt brotið, kunnu hesi verða sektað.
(Stk. 3. Løgfrøðiligir persónar kunnu verða álagdir revsiábyrgd sambært kap. 5 í revsilógini. Alternativ orðing um broyting í revsilógini viðvíkjandi løgfrøðiligum persónum kemur í gildi áðrenn henda lóg.)
Stk. 4. Málini fara fram sum politimál. Tey í rættargangslógini, kap. 69 (handtøka), kap. 70 (varðhaldsfongsling), kap. 72 (upptøka) og kap. 73 (rannsókn) nevndu tiltøkini koma tó eisini í nýtslu í sama mun, sum í málum, sum statsákærarin søkir at.

Gildiskoma

§ 18. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2004.
Stk. 2. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 43 frá 22. maj 1969 um vápn.

§ 19. Tann sum áðrenn henda lóg kemur í gildi, lógliga eigur høglbyrsu, men sum eftir at lógin kemur í gildi, eigur hana ólógliga, kann við at boða Føroya Landfúta frá innan 12 mánaðir fáa loyvi til at eiga hesa . Skrásetingarnummarið á høglbyrsuni skal samstundis verða upplýst.
Stk. 2. Tann sum áðrenn henda lóg kemur í gildi, lógliga eigur annað vápn enn høglbyrsu ella vápnalut til annað vápn enn høglbyrsu,

men sum eftir at lógin kemur í gildi, eigur vápnið ella vápnalutin ólógliga, kann innan 12 mánaði søkja Føroya Landfúta um at fáa loyvi til at eiga hesi lógliga. Skrásetingarnummarið á vápnunum skal samstundis verða upplýst.

Viðmerkingar til lógaruppskotið

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Økið er í dag reglusett við løgtingslóg nr. 43 frá 22. maj 1969 og kunngerð nr. 57 frá 12. september 1969.

Orsøkin til at broyta vápnalógina er í fyrsta lagi, at stóru samfelagsligu broytingarnar seinasta mansaldurin hava gjørt, at lógin ikki longur hóskar til samfelagið.

Tá lógin varð gjørd, vóru Føroyar eitt fiski*veiðu*samfelag, mestsum burturav. Tilveran hjá teimum flestu – bæði á bygd og bý – var bygdarkend, og náttúrutengd vinna ella atvinna á sjógvi og landi var partur av gerandisdegnum.

Nú vinna føroyingar flestir í sekunderu og tertieru vinnugreinunum, og fólk allarflest – bæði á bygd og í bý – liva eina munandi meira býargjørda tilveru, har sambandið við náttúruna er nógv minni, og nógv meira umvegis, skipað og tilgjørt. Tað er eftir hondini minni og minni vanligt at fólk sjálvi heysta av livandi tilfeingi náttúrunnar á sjógv og landi, og gera tey tað, er tað aloftast einans sum ítriv. Mestur matur er klárur at koyra í pottin, longu áðrenn fólk útvega sær hann.

Sambandið og samveran millum ættarliðini eru nú eisini meira skipað, savnað og miðvís, og tí eru so nógv sløg av vitan, kunnleika og hugburði, sum ikki longur verða borin sjálvsøgd og mestsum ósøgd millum ættarliðini. Soleiðis er eisini við hugburðinum til vápn – bæði skotvápn og eggjørn - og alt færri læra mestsum sjálvsagt at handfara tey.

Samstundis verða uppvaksandi ættarliðini um sjónvørp og teldur ávirkað av fremmandari harðskapsmentan, ið førir vápnaðan harðskap fram sum nakað sjálvsagt og gerandis.

Vápn ímynda tí fyri tey flestu alt meira harðskap (ella í besta føri ítrótt), og alt minni veiðu ella at matskaffa sær yvir høvur.

Ítøkiliga hava verið nakrir veruligir harðskapstilburðir seinastu árini, har skotvápn eru nýtt, og tí er mett ráðiligast at broyta lógina, at vita um ikki ber til at tálma vápnaða harðskapinum, áðrenn hann tekur undir seg.

Ætlanin er at gera hetta við at tátta í við loyvum, soleiðis at betri trygd er fyri, at hugburðurin til vápn er hin rætti, at ein sunnur hugburður til vápn og vápnabrúk verður borin víðari, og at vápn verða handfarin og goymd soleiðis, at sum minstur vandi stendst av.

Kortini er havt í huga, at vápnalóggávan ikki skal gerast so strong og óliðilig, at hon skundar undir menningina burtur frá náttúrutengda partinum av siðaarvi okkara, og tí eru eisini onkrar smávegis linkingar í mun til galdandi lóg.

Lógin miðar ímóti at tryggja hesi atlit við at øll tey, sum hereftir ogna sær skotvápn – eisini høglbyrsur – skulu hava fingið loyvi frammanundan.
Tey skulu lúka ávís minstukrøv, umframt aldursmarkið, fyri at fáa loyvi, og ómaksgjald verður kravt fyri loyvi.
Tó fara øll, sum í dag lógliga eiga høglbyrsur, at fáa loyvi til at eiga og nýta hesar framhaldandi. Tey verða at skula søkja um loyvi, men kannað verður ikki, hvørt tey lúka nýggju terytirnar sum lógin setir, og tey skulu ikki gjalda fyri loyvini.

Verulig førleikakrøv verða ikki ásett; men Fútin fær heimild at kanna at onki er, sum talar ímóti, at umsøkjarin fær loyvi at hava vápn, samstundis sum ásetingar eru, sum skulu tryggja, at tey sum fáa vápnaloyvi, hava ein ávísan grundleggjandi kunnleika til vápnabrúk.

Við hesum verða so at siga øll skotvápn eyðmerkt og skrásett, samstundis sum loyvini verða givin ávísum persóni.

Krøvini til hvussu vápn verða goymd og flutt, verða herd og nágreinað, men tó verður ikki skotið upp at øll vápn skulu verða goymd í vápnaskápi.

Sí ásetingarnar í §§ 10-15, og serligu viðmerkingarnar til hesar

Krøvini til teirra sum selja vápn, og til hvussu handlar goyma vápn, verða herd og nágreinað.

Sí ásetingarnar í §§ 8 og 9 og serligu viðmerkingarnar til hesar, og serligu viðmerkingarnr til § 2, stykki 1.

Revsiásetingarnar í lógini verða herdar og dagførdar.

Sí ásetingarnar í § 17, og serligu viðmerkingarnar til hesa.

Endiliga eru smávegis tillagingar gjørdar í summum meginreglum, eitt nú ásetingunum um aldursmørk, har ávís frávik verða sett inn, soleiðis at eitt nú tann siðvenja sum longu er við at hava meira tilkomnan ungdóm við í fugla- og haruveiðu, verður loyvd í ávíasn mun.

Uppskotnu broytingarnar fara samstundis at gera at lógin verður í betri samsvari við samsvarandi lógirnar í grannalondum okkara. Hetta er eisini eitt mál í sjálvum sær, nú samhandil, samvinna og ferðing landanna millum eru so stór og vaksandi.

Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar við sær fyri landið.
Landið skal fíggja og lata reka eina nýggja telduskrá, har politiið verður at skráseta øll loyviskrevjandi skotvápn og øll vápnaloyvi.

Ymsir verkligir møguleikar hesum viðvíkjandi verða kannaðir nærri í løtuni, herundir at laga donsku ella íslendsku vápnaskránna til føroysk viðurskifti. Ein slík skrá verður ætlandi at kosta millum XX og ZZZ kr at útvega, og um WW kr um árið í rakstri.

Uppskotið hevur ikki nevniverdar umsitingarligar avleiðingar fyri landið, uttan eina lítið økta arbeiðsbyrðu á Landsfólkayvirlitinum (í sambandi við tænastur til Føroya Landfúta um vápnaskránna), sum tó verður loyst við verandi starvsfólkatilfeingi.

Í byrjunnarstiginum verður Løgmálaráðið at gera kunngerðir, og kravfesta og útvega telduskránna í samstarvi við Fútan. Kravfesting og útvegan krevja, at tænastur verða keyptar, men annars verða uppgávurnar loystar við verandi starvsfólkaorku.

Uppskotið kann hava avleiðingar fyri kommunur, tí kommunur eru eins og landsmyndugleikar undantiknar í galdandi lóg, meðan lógaruppskotið ikki undantekur kommunalar myndugleikar, tí at mett verður, at tørvurin hjá kommununum fyri at hava vápn, er so avmarkaður, at onki er til hindurs fyri, at kommunur skulu søkja loyvi á sama hátt sum aðrir løgfrøðiligir persónar, um tørvur skuldi verið. Sí annars serligu viðmerkingarnar til grein 6.

Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri danskan myndugleika, tí Føroya Landfúti skal geva loyvi, og skráseta loyvini og vápnini. Fútin tekur undir við uppskotnu broytingunum og politiið og fútin hava verið umboðað í arbeiðsbólkinum sum hevur gjørt uppskotið.

Uppskotið hevur fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna:

a. krøvini til hvussu handlar goyma vápn, og sýna tey fram, verða herd
b. krøvini til teirra, sum fáa loyvi at selja vápn, verða herd
c. krøvini til starvsfólk í handlum, sum selja vápn, verða herd
d. handlarnir fáa fleiri skyldur í sambandi við at skráseta vápn, lóður og sølu.

Uppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar við sær fyri serstøk øki í landinum.

Uppskotið hevur ikki sosialar avleiðingar við sær fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Uppskotið er tengt at millumtjóða sáttmála:
Nýggja ásetingin í § 1, 4. stykki, bannar evnafrøðiligum- og geislavápnum, soleiðis at landið lýkur tær skyldur, tað hevur samsvarandi Sáttmála Sameindu Tjóða um at banna evnafrøðiligum vápnum. Annars er uppskotið sum heild ikki beinleiðis tengt at millumtjóða sáttmálum.

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/ økir í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja

búskaparligar avleiðingar					
Umsitingarligar avleiðingar	(Ja)	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Stk. 1
Útgangsstøðið er eitt alment forboð fyri yvirhøvur at innflyta, útflyta, útvega sær, hava, eiga, bera ella brúka vápn. Í mun til galdandi lógina er í høvuðsheitum bert talan um at greiða gjølligari frá, hvørjar gerðir ikki eru loyvdar.

At útflyta hevur tó ikki verið fevnt av § 1, stk. 1 áður, men við at fáa útflutning í stk. 1, verða allar gerðir, ið krevja loyvi, savnaðar í somu áseting, tó ikki framleiðsla, ið framvegis krevur loyvi frá landsstýrismanninum.

Loysnin er hent og borgaravinarlig, um heimildin til at loyva útflutningi av vapnum og lutum í stk. 1 liggur hjá Føroya Landfúti, tí at Føroya Landfúti hevur sum nú er heimildina at loyva innflutningi og annars at hava, ganga við, fáa útflýggja o.t. tey vápn, sum nevnd í § 1, stk. 1. Fútin hevur tí longu skrásett tey vápnaloyvi, sum eru givin. Í sambandi við útflutning kundi skráseting farið fram á sama mál, sum vápnaloyvi er givið. Harumframt kann borgarin fáa allar spurningar (uttan viðvíkjandi framleiðslu) um vápn greiddar á einum stað.

Nr. 1 – skotvápn o.a.
Reglan er dagførd í mun til galdandi lóg, soleiðis at baskylur og húsar (magasin) eisini eru fevnd av forboðnum.

Baskyli eru tánn partur av skotvápninum aftanfyri og ella uttanum kamar og pípu, sum ikki er skefti og lás, ella trygging og stillipinnur og mekanismurnar til hesar.

Sum skotvápn verður serliga hugsað um vápn, sum við lóðuri av krúti ella øðrum rekevni, ella við eini mekaniskari skipan kunnu skjóta út kúlur, høgl ella onnur projektil, t.d. skammbyrsa, rifla og høglbyrsa. Eisini verður hugsað um vápn ella tól, sum skjóta ella senda út spreingilóður, gas,

signalljós, rakettir og tílíkt. At enda verður hugsað um vápnaeftirlíkningar, sum hampuliga lættliga kunnu verða lagaðar til, soleiðis at til ber at nýta skarpt lóður, meðan lógin ikki fevnir um leiku.

Skiftisreglur eru í § 17 í lógaruppskotinum fyri tey vápn, sum áður hava verið fevnd av § 2, stk. 1 (tað vil siga at loyvi ikki hevur skulað til teirra), men sum nú verða fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1, serliga høglbyrsur (tað vil siga at loyvi verður kravt).

Nr. 2 – lóður
Reglan er tann sama sum í galdandi vápnalóg.

Nr. 3 – brókarbogi og sleingibyrsa

Brókarbogi
Brókarbogi (eisini nevndur lásbogi og teinabogi) er vápn, sum skjýtur pílar neyvt og við stórari ferð.

Brókarbogin kann vera sera tøkniliga framkomin, soleiðis at væl ber til at fjala hann spentan uppiá sær, og tað er ikki sum við aðrari bogaskjóting, at tað krevur styrki og venjing at nýta hann.

Brókarbogi er allarhelst í dag fevndur av reglunum um luft- og fjarðabyrsur. Tískil kunnu persónar sum eru fyltir 18 ár frítt keypa og eiga brókarboga, meðan persónar undir 18 ár skulu hava loyvi.

Brókarbogi er eitt vandamikið vápn, og mett verður, at fá eru í Føroyum.

Sleingibyrsa
Sleingibyrsa verður gjørd í fleiri útgávum. Tær mest framkomnu eru verksmiðjuframleiddar til stálkúlur og hava sikti. Ein heimagjørd sleingibyrsa, sum onki serligt er við, er í dag neyvan fevnd av ásetingunum í vápnalógini, meðan ein framkomin sleingibyrsa sambært rættarsiði er fevnd av ásetingunum um luft- og fjarðabyrsur. Sostatt kunnu persónar yvir 18 ár frítt keypa og eiga sleingibyrsur, meðan bert persónar undir 18 ár skulu hava loyvi.

Sleingibyrsan er óneyv, men framkomnar sleingibyrsur krafta væl, og eru tí vandamiklar. Av tí at tær eru somikið óneyvar eru tær mestsum ónýtiligar, eitt nú í ítróttarhøpi, men tær verða nýttar aðrastaðni til ólóglig endamál, eitt nú í sambandi við mótmælisgongur og skipaðan ófrið.

Mett verður tí rættast, at sleingibyrsa og brókarbogi verða fevnd av forboðnum, soleiðis at tað verður ólógligt at eiga hesi vápn eftir at lógin er komin í gildi, og at neyðugt verður at søkja um loyvi til hvørja einstaka sleingibyrsu og hvønn einstakan brókarboga, t.d. til ítróttarendamál.

Skiftisreglur krevjast ikki fyri hesi vápn, tí talan er allarhelst um so fá vápn – um nakað yvirhøvur. Eitt alment forboð verður tí ikki til nevniverdan ampa.

Nr. 4: Signalvápn og gas – og signalvápn í einum

Signalvápn og gas- og signalvápn í einum eru til í ymiskum útgávum, sum ofta eru líkar veruligum skotvápnum. Vápnini verða vanliga nýtt í sambandi við ítróttartiltøk, hundavenjing og sum partur av neyðarútgerðini umborð á bátum og skipum. Harumframt kann hugast, at tey verða nýtt í sambandi við okkurt yrki, t.d. í aling og landbúnaði.

Vápnini kunnu tó lættliga nýtast í samband brotsverk, og kunnu vera vandamikil, bæði tá leys lóur og gass lóður verður nýtt. Verður skotið við frástøðu 1 m, er vandi fyri meini á eyguni, og krútgassið kann elva til brotin rivjabein og skallabrot. Verður byrsumúlin settur ímóti, kann skotið vera beinleiðis lívshættilisligt.

Broytingin hevur til endamáls at minka um talið av hesum vápnum, og at loyvi skal verða givið í hvørjum einstøkum føri, tá tað hevur eitt alment viðurkent endamál, t.d. sum partur av trygdarútgerð, til ítróttarendamál o.a.

Tjekkast í mun til fírverkarílóggávuna, nýtt forboð.-

Nr. 5 og nr. 7 - Ljóðdoyvarar og optisk elektronisk siktuamboð
Ljóðdoyvarar og optisk elektronisk siktiamboð eru í dag ikki fevnd av vápnalógini, hóast at tey lættliga kunnu nýtast í hesum sambandi. Altsamt fleiri skotvápn kunnu nýta bæði ljóðdoyvara og siktiamboð, og ger tað hesi vápn nógv vandamiklari enn annars. Tí verður hildið rættast, at ljóðdoyvarar og optisk elektronisk siktuamboð eru fevnd av forboðnum í lógini.

Nr. 6 - Pipardósir
Her vantar okkurt um hvussu vápnið virkar, hvussu hættisligt tað er, og um tað er vanligt – ella gerst vanligari.

Stk. 2
Ásetingarnar eru innihaldsliga tær somu sum í galdandi vápnalóg § 1, stk. 2, sum tó bert heimilar landsstýrinum at geva loyvi.

Endamálið við broytingini er at geva landsstýrismanninum møguleikan at geva heimildina til annan stovn, skuldi hetta verðið neyðugt. Her verður serliga hugsað um, stovnar, ið hava ein serligan førleika og royndir innan hetta serliga vápnaøkið annars.

Stk. 3
Ásetingin er innihaldsliga tann sama sum í galdandi vápnalógini.

Stk. 4 - Evnafrøðilig- og geislavápn

Løgtingslóg nr. 34 frá 18. mars 2003 um umsjón, váttanarveitan, og eftirlit samsvarandi Sáttmála Sameindu Tjóða um at banna evnafrøðiligum vápnum hevur til endamáls at at banna evnafrøðiligum vápnum. Við nýggju ásetingini verða evnafrøðilig- og geislavápn sostatt bannað.

Stk. 5 - forboð yvirhøvur
Tann 7. august 1963 samtykti Trygdarráðið hjá ST eina samtykt (resolution), sum heitti á øll lond um at steðga sølu, ferming og avskipan av vápni og lóðuri yvirhøvur og hernaðarlig akfør til Suðurafrika. Tað ber einans til at fylgja slíkum samtyktum viðvíkjandi teimum amboðum og lutum,

sum nevnd eru í § 1, stk. 1. Við nýggju ásetingini er møguligt fyrisitingarliga at banna útflutningi av vápnum og lóðuri yvirhøvur, ikki bert teimum, ið nevnd eru í § 1, stk. 1 og stk. 2.

Til § 2

Stk. 1
Galdandi ásetingarnar í vápnalógini § 2, stk. 1, nr. 1 og 2 um slættpípaðar halgbyrsu og lutir til eru tiknar úr. Hesi vápn hava higartil verið undantikin forboðnum, og tey sum eru fylt 18 ár hava havt frítt at keypa og eiga hesi vápn uttan loyvi.

Ætlanin er, at hesi vápn verða ístaðin fevnd av almenna forboðnum í § 1, stk. 1, nr. 1 og nr. 2 um skotvápn og lóður til skotvápn, tí alt fleiri tilburðir hava verið við hesum vápnum, bæði vanlukkur og brotsverk. Mælt verður tí til at hesi vápn verða fevnd av forboðnum, soleiðis at søkjast skal um loyvi til hvørt einstakt vápn, t.d. til veiðuendamál, ítróttarendamál, í stríði ímóti skaðadjórum ella til vápnasavn.

Nr. 1, 2 og 3
Ásetingarnar eru innihaldsliga tær somu sum í galdandi vápnalóg § 2, stk. 1, nr. 2-4. Tó eru brógkabogi og sleingibyrsa ikki longur undantikin.

Nr. 3 og 4
Lógin hevur higartil verið tulkað soleiðis, at vápn, sum ikki kunnu nýta lóður, sum er at fáa í dag og framløðingar, ikki eru fevndir av lógini, tí at hesi vápn vanliga ikki kunnu nýtast at skjóta við vegna aldur ella vantandi lóður. Vápnini eru ofta savnslutir ella samlaralutur.

Í dag verða hesi gomlu vápn endurgjørd í hópframleiðslu, tó soleiðis at tey kunnu nýta lóður, sum er at fáa í dag. Av tí at hesar endurgerðirnar kunnu nýtast til at skjóta við, í mun til tey gomlu vápnini, sum sjáldan kunnu skjóta, verður mælt til, at bert tey gomlu vápnini eru fevnd av undantaksloyvinum, meðan endurgerðirnar eru fevndar av generella forboðnum í § 1, stk. 1, nr. 1, soleiðis at loyvi krevst í hvørjum einstøkum føri.

Orsøkin til, at bert bakløðaravápn, sum er framleitt áðrenn 1870, og sum ikki kann nýta eindarpatrónir (tær patrónir, sum í dag vanliga eru at fáa), eru fevnd av undantaksloyvinnum er, at tey vápn, sum kunnu nýta eindarpatrónir, ofta kunnu nýta lóður, sum er at fáa í dag.

Stk. 2
Ásetingin er innihaldsliga tann sama sum í galdandi vápnalóg.

Stk. 3
Við hesi ásetingini verður loyvt persónum niður í 15 ár at nýta luftbyrsu í sambandi við ymisk tiltøk, t.d. í skotbásunum á Ólavsøku. Tað er tó treytað av, at politiið hevur góðkent tiltakið og viðkomandi, ið hevur ábyrgdina av tiltakinum.

Harumframt er tað ein treyt at tann ið hevur ábyrgdina av tiltakinum er yvir 23 ár til tess at tryggja, at viðkomandi er nóg búgvin og er tilvitandi um ta serligu ábyrgdina, ið viðkomandi hevur, tá ung fólk skulu handfara skotvápn.

Stk. 4
Tað hevur verið mett ráðiligt at lata vera við at krevja loyvi til luft- og fjarðabyrsur, tí at tær ikki eru so sterkar at tær eru veruliga vandamiklar, skulu tær vera hampiliga lættar at handfara; men seinastu árini eru serliga luftbyrsurnar mentar sera nógv. Heldur menningin fram, verða luftbyrsur væntandi skjótt at krafta og raka eins væl og salongriflur, er boðið bert einar hálvthundrað metrar. Mett verður, at um so verður, eiga sterku luftbyrsurnar at kunna verða bannaðar, eins og salongriflur. Til ber at menna frarðabyrsur eins og luftbyrsur, og tí verður mett ráðiligt at kunngerðarheimildin eisini fevnir um forboð móti sterkari fjarðabyrsum.

Til § 3

Stk. 1
Skotið verður upp, at tað ikki verður loyvt at ganga við knívi og øðrum líknandi vápnum á støðum, har atgongt er fyri almenningin, burtursæð frá minni felliknívum, uttan so at endamálið rímiligt og í samsvar við uppgávu og tørv hjá honum, ið gongur við tí og umstøðurnar annars tala fyri.
Her verður serliga hugsað um grindadráp, veiðu, stuttleikafiskarí, ítrótt, skótar, yrki ella annað viðurkent endamál.

Tað verður soleiðis bannað at ganga við knívi ella líknandi, er tað ikki til nakað ávíst endamál. Endamálið við at bera vápnið skal verða rímiligt og nøktandi, og tað er ikki eitt viðurkent endamál at bera vápn til at verja seg við, skuldi vandi verið á ferð.

Skal knívurin harafturímóti nýtast í sambandi við eitt lógligt endamál sambart lógini, er loyvt at bera hann. Harumframt er eyvitað loyvt at flyta knívin úr staði í stað til endamálið, eisini um støð, ið eru atgongd fyri almenningin. Ætlanin er eisini at raka onnur vápn, t.d. øks og onnur eggjørn, ið verða nýtt sum vápn.

Tað er ákæruvaldið, ið hevur prógvbyruna fyri, at ásetingin er brotin. Men sjálvsagt skal ákærdi eisini kunna vísa á aðrar umstøður enn bert at nevna eitt lógligt endamál, tá ivi er um, um talan er um brot á lógina, t.d klæði, tíð, stað, á hvønn hátt verður knívurin borin osfr.

Umstøður eru eisini, har tað vanliga ongantíð er loyvt at bera vápnið, t.d. tá farið verður í býin at stuttleika sær, til fótbóltsdyst o.s.fr.

Støð, ið eru atgongt fyri almenningin eru t.d. vegir, parkir, almennar bussleiðir, handlar í upplatingartíðini, sølumiðstøðir, almennar skrivstovur, svarandi til økið í politiviðtøkuni § XX

Forboðið fevnir ikki felliknívar, er blaðið styttri enn 8,5 cm, tí hóast samfelagsbroytingar er tað helst enn at meta sum vanlig siðvenja at hava felliknív uppiá sær, og fólk nýta teir til heilt vanlig endamál í gerandisdegnum.
Í grannalondunum er vanliga mestamarkið fyri felliknívar 7 cm, skulu teir vera undantiknir forboðnum, men mett verður at í Føroyum er vanligt at hava felliknívar sum eru heldur størri. Felliknívar, ið í vanligari talu verða umrøddir sum vanligir/meðalstórir, eru upp til 7,5 cm, meðan teir "vanligu" stóru felliknívarnir (t.d. av slagnum Løwen Messer) eru um 8,5 cm, mátað úr oddinum heilt inn at skeftinum.

Mett verður ikki, at tað er so avgerandi at markið skal vera júst 7 cm. Tað sum mest um ræður er at seta eitt mark, sum ein vegin ikki kennist sum órímiligt inntriv í gerandisdagin, men sum hin vegin forðar fyri at heilt stórir felliknívar verða bornir, tí teir eru illa nýtiligir sum annað enn vápn.

Stk. 2
Ásetingin í § 3, stk. 2 er at finna í galdandi vápnalóg § 1, stk. 1, nr. 4 um støkkknívar og støkkstilletar.

Við nýggju ásetingini verður skotið upp, at fleiri amboð og lutir verða fevnd av almenna forboðnum í lógini. Heimildin at geva loyvi hevur higartil ligið hjá Føroya Landfúta, og hildið verður best, um tað framvegis er hesin stovnur, ið umsitur vápnaloyvi til tey amboð og lutir, ið nevnd eru, tí tey eru so lík støkkknívum og støkkstilettum.

Nr. 1 Hvussu við skutli og hvalvákni?

Nr. 2

Nr. 3

Nr. 4

Nr. 5

Nr. 6

Nr. 7

Nr. 8

Nr. 9

Nr. 10
Her vanta viðmerkingar

Stk. 3.
Sí viðmerkingarnar til § 4, stk. 1 um skjalprógv.

Stk. 4
Talan er um eitt undantak frá § 3, stk. 2, nr. 1 um hvøss vápn ella stingvápn við størri blaði enn 12 cm og § 3, stk. 2, nr. 7 um slag – ella stoytvápn.

Fleiri av hesum vápnum hava eitt vanligt og rímiligt endamál, t.d. ein breyðsag, grindaknívur osfr., og ætlanin er ikki at raka hesi vápn við einum forboði, ella at tað skal søkjast um loyvi til at innflyta, selja ella keypa t.d. breyðsagina, tá tey eru gjørd og verða nýtt til hesi endamál.

Til § 4

Stk. 1 og 2
Ásetingin er ein samanskriving av ásetingunum í § 2, stk. 1 og § 3 í galdandi vápnalógini. Harumframt er eitt 18-ára aldursmark sett, sum viðkomandi skal skjalprógva at lúka. Tó kunnu persónar millum 16-18 ár nýta høglbyrsu saman við vaksnum fólki, ið lúka treytirnar fyri at nýta høglbyrsu. Annars eru tað somu reglur, ið er í galdandi vápnalógini.

Stk. 3
Reglan er nýggj í mun til galdandi vápnalógina, og er sett inn til tess at tryggja, at fólk yngri enn 18 ár, ið arva vápn, kunnu fáa loyva at eiga tey. Loyvið umfatar bert at eiga, meðan aðrar gerðir, t.d at bera, brúka ella selja vápnið ikki er fevndar av einum møguligum undantaksloyvið. Heimildin at taka hesa avgerð er løgd til Føroya Landfúta, ið mettur verður at hava neyðuga kunnleikan til at taka hesa avgerð.

Stk. 4
Reglan er tann sama sum í galdandi vápnalógini § 3, stk. 2.

Til § 5

Reglan er ein víðariføring av § 5 í galdandi vápnalógini, soleiðis at uppgávan hjá Føroya Landfúta í hesum sambandi verður greiðari.

Til § 6

Galdandi vápnalóg § 6 ásetir, at ríkis-, lands- og kommunulu myndugleikarnir eru undantiknir ásetingunum í lógini. Undantakið er breitt orðað, tí tað kunnu hugsast fleiri myndugleikar, sum ikki hava tørv a vápnum og tískil ikki brúk fyri heimildini at útvega sær hesi. Nýggja orðingin avmarkar talið á myndugleikum, ið kunnu útvega sær vápn, til bert at umfata teir, sum í sínum virki hava tørv á at hava vápn. Her verður t.d. hugsað um politiið, sjóverjuna, fiskiveiðueftirlitið og landsdjóralæknan. Samstundis verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, hvørjir hesir myndugleikar eru.

Til § 7

Stk. 1
Tey seinnu árini hava alt fleiri skottilburðir verið, ið standast av ósketni. Skottilburðir føra ofta við sær langa sjúkralegu, avlamni og í ringasta føri deyða. Til tess at lækka talið á hesum tilburðum verður skotið upp, at viðkomandi, ið søkir um vápnaloyvi, skal hava viðmæli frá 2 persónum. Hetta verður gjørt til tess at fremja neyðugu hugburðsbroytingina innan vápnaøkið. Tað er einans neyðugt at duga at skjóta, men eisini at handfara vápnum, eisini ásannandi, at eitt forboð einsamalt ikki loysir hesar trupuleikarnar. Neyðugt er við eini hugburðsbroyting millum manna um, hvussu vandamikið eitt vápn er, tá tað ikki verður handfarið rætt.

Ætlanin er eisini at fáa eitt byrsufelag til at standa á odda í hesum átaki. Eitt byrsufelag kann vera við til at fáa í lag hesa hugburðsbroyting og fáa skjóting í eina fasta og tryggja legu í Føroyum.

Skal skoytast meira uppí

Stk. 2
Samstundis sum reglur verða ásettar fyri at fáa loyvi til høglbyrsu, verður eisini heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um skjalprógv og roynd í vápnabrúki, handfaring og skjóting fyri tey, ið annars søkja um loyvi sambært § 1, stk. 1 og 2. Tað kann t.d. verða serligar treytir fyri loyvi til riflu. Orsøkin til, at hetta ikki er ásett beinleiðis í lógini eins og við høglbyrsu er, at talan er um so fá vápn, og umsitingarliga siðvenjan frammanundan er sera strong. Hesar reglur skulu tí gerast í tøttum samstarvi við Føroya Landfúta.

Til § 8

Stk. 1
Ásett verður, at tað er Føroya Landfúti, ið heimild til at geva loyvi til at reka handilsvirksemi við vápnum, lóðuri og meira. Hesa heimildina hevur Føroya Landfúti eisini sambært galdandi vápnakunngerð (Kunngerð nr. 57 frá 12. september 1969 um vápn). Talan er um eina meira útgreinaða áseting um hvørjar treytir skulu verða loknar, áðrenn loyvi verður givið.

Umframt vanligu treytirnar fyri at reka handilsvirksemi, skal tann, ið ynskir at reka handilsvirksemi við vápnum, lúka nakrar serligar treytir, grundað á, at vápn eru vandamikil, og at tað er neyðugt við serligum tryggleika í hesum sambandi, bæði fyri at verja móti vanlukku og móti stulduri.

Hann, ið ynskir at reka handilsvirksemi við vápnum, skal sjálvur hava neyðuga serkunnleikan til vápn og vápnavirksemi fyri á henda hátt at geva bestu tænastuna og hjálpina í sambandi við eitt keyp. Fólk, ið starvast hjá honum í sambandi við handilsvirksemi við vápnum, skulu eisini hava neyðugan serkunnleikan.

Handilsmaðurin skal eisini kunnu goyma vápn, lóður og annað undir tryggum umstøðum. Krøvini til, hvussu vápn og annað verður goymt í einum handli skulu herast í mun til krøvini til ein privatan. Hetta er grundað á, at ein vápnahandlari alloftast hevur fleiri vápn liggjandi, eisini vandamiklari vápn, og at vandin fyri stulduri av vápnum er nógv størri hjá einum handilsmanni enn einum privatum, tí her kann tjóvurin verða næstan vísur at finna vápn.

At enda verður ásett, at tað er ein ítøkilig meting hvørja ferð, um viðkomandi kann fáa loyvi at reka handilsvirksemi við vápnum, tí tað kunnu verða umstøður, ið gera, at viðkomandi ikki verður mettur sum egnaður at verða vápnahandlari. Tískil mugu atburður og persónlig viðurskifti annars verða í lagi. Sum dømi um viðurskifti, ið kunnu hugsast at verða til hindurs fyri, at viðkomandi fær loyvi, eru harðskapsdómur, groft ósketni, ella at handilshølini ikki eru í lagi.

Stk. 2
Loyvisbrævið skal áseta, hvat slag og nøgd av vápni, lóðuri og meira, sum er fevnt av loyvinum, og sum handilsmaðurin sostatt hevur loyvi at selja, og hvussu hesir lutir skulu goymast. Á henda hátt verður ikki ivi um, hvat handilsmaðurin kann hava í handli sínum. Harumframt gevur tað eisini eina ábending um, hvussu stór goymslan skal verða.

Ásetingin gevur eisini Føroya Landfúta heimild til at eisini at geva loyvi til umvælingar og aðra tænastu, sum er nátturligur liður í handilsvirksemi við vápnum, um treytirnar í stk. 1, nr. 1-4 eru loknar. Í løtuni er ongin vápnasmiður í Føroyum, men tað eigur at verða møguleiki fyri at fáa loyvi til at reka eisini hetta slag av virksemi, um ein skikkaður stóð fyri hesum.

Stk. 3
Ásett verður, at er umsøkjarin ein løgfrøðiligur persónur, er tað leiðarin ella stjórin, ið skal lúka treytirnar í stk. 1.

Stk. 4
Loyvið at reka handilsvirksemi verður bert galdandi fyri 5 ár í senn. Aftan á 5 ár skal viðkomandi søkja av nýggjum um loyvið. Tað merkir, at treytirnar fyri at fáa loyvið skulu lúkast av nýggjum fyri á henda hátt at tryggja, at umstøðurnar støðugt eru í lagi, og at eitt loyvi ikki verður galdandi óavmarkað, er tað fyrst einaferð fingið til vega.

Stk. 5
Tað verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um handilsvirksemi við vápnum. Heimildin hjá landsstýrismanninum fevnir um at áseta reglur um handilsvirksemi við vápnum, herundir skyldur handilsmansins í hesum sambandi, persónlig krøv til førleika hansara og førleikan hjá starvsfólki hansara, og onnur persónlig viðurskifti av týdningi, um innrætting og góðkenning av hølum, tekniskar forskriftir fyri vápn, lóður, høli og meira, um hvussu longi, loyvið er galdandi og um endurnýggjan av loyvi.

Tað eru praktisk umsitingarlig sjónarmið, ið liggja aftan fyri heimild landsstýrismansins. Talan er um endurskoðan av eini gamlari lóggávu, og í sambandi við hesa endurskoðan verður tað mettt neyðugt við strangari reglum fyri handilsvirksemi. Talan um nýggjar ásetingar í mun til galdandi reglur, og tað má viðurkennast, at tað ikki altíð ber til at vita heilt sakliga og greitt, hvørjar reglur skulu verða galdandi. Hendan metingin ber einans til at gera, tá ið lógin hevur virkað eina tíð. Harumframt kunnu ásetingarnar hjá landsstýrismanninum lættari broytast,og skipanin gerst meira smidligari, um tað vísir seg, at fortreytirnar fyri onkrum ávísum reglum ikki halda, Tískil er tað ikki ætlanin, at heimildin hjá landsstýrismanninum skal nýtast í fyrsta umfarið.

Til § 9

Her vanta viðmerkingar

Til § 10

Galdandi vápnalóg hevur onga áseting um, hvussu vápn skulu goymast, men í vápnakunngerðini verður ásett, at vápn skulu goymast forsvarliga og yvirhøvur ikki atkomuligt hjá óviðkomandi. Eisini verður ásett, at lóður til skotvápn skal goymast undir lási, og atum so er at handskotvápn ikki eru undir lási, skal lásið ella botnstykkið takast úr og leggjast undir lás.

Ásannast má, at galdandi reglur ikki hava verið nøktandi, og neyðugt er at áseta betri reglur um hvussu vápn skulu goymast, bæði heima og úti, til tess at tryggja, at óviðkomandi onga atgongd hava til vápn ella lóður.

Ásetingarnar skulu forða fyri óætlaðum og óneyðugum skottilburðum, sum kunnu gera stóran skaða, bæði á fólk og lutir. Harumframt skal ásetingin eisini forða fyri óviljaðum drápi.

Stk. 1
Endamálið við hesi almennu reglu er at gera vart við, at tað er eigarin av einum vápni, ið hevur almennu ábyrgdina av hesum, og tískil hann, ið skal tryggja, at vápnið er goymt undir tryggiligum

umstøðum. Ásetingin er eisini galdandi undir nýtslu av einum vápni, lóðuri og meira, soleiðis at tað ikki liggur og flýtir t.d. undir veiðu.

Stk. 2.
Ásetingin fevnir um vápn, ið ikki verða nýtt. Hesi vápn skulu tá verða goymd undir tryggiligum umstøðum, og skal lóður heldur ikki goymast í sama rúmi sum vápnið fyri at forða fyri t.d. stulduri, ella at børn kunnu koma framat einum vápni og harvið møguliga gera skaða. Ásetingin hevur eisini tann fyrimun, at tað krevur eina aktiva handling at koma framat og at løða vápnið, soleiðis at møguligt illsinni fær tíð at renna av.

Tað er í dag ein stórur marknaður av skápum, ið kunnu liva upp til treytirnar um, at óviðkomandi ikki mugu hava atgond, og tey eru til keyps í øllum príslegum.

Á líka tryggan hátt merkir, at óviðkomandi onga atgongd hava. Vápnið skal ikki vera tað fyrsta, ið ein sær, t.d. tá tað stendur við síðuna av oljufýrinum, í bilhúsinum ella amboðsrúminum. Men tað skal heldur ikki verða fjalt undir songini ella í klædnaskápinum, tí hetta eru serliga støð, har børn krógva seg og spæla. Munur er eisini á at goyma tað í einum yvirskápi ella undirskápi, men felags fyri teir tryggu goymsluhættirnir er tó, at vápnið verður goymt undir lási onkursvegna, soleiðis at óviðkomandi onga atgongd hava.

Stk. 3
Ásetingin skal tryggja, at skotvápn og lóður verða goymd tryggiliga, tá tey verða flutt úr stað í stað so at flutningurin gerst tryggari. At vápn og lóður skulu verða goymd tryggiliga merkir t.d., at vápnið ella lóðuri er undir støðugum eftirliti ella goymd við onkrum breitt út yvir í einum stongdum bili ella á annan líka góðan hátt.

Endamálið er at óviðkomandi ikki sleppa framat t.d einum ólæstum bili, ella at vápnið liggur frítt frammi í bilinum, uttan at verða fjalt á nakran hátt, t.d. undir teppi í viðførisrúminum í bilinum, og at lødd vápn ikki verða flutt úr stað í stað og handfarin, sum um tey vóru ólødd, tá tey t.d. verða tikin úr bilinum, tí vandi er fyri, at tey kunnu ganga av og elva til stóran skaða. Vápn mugu heldur ikki verða flutt, meðan tey eru lødd.

Eisini verður ásett, at um tað ikki er til stórvegis ampa, skal vápnið takast sundur og pakkast niður, tá tað verður flutt úr stað í stað. Her verður t.d. hugsað um, at eitt vápn ikki verður sett saman, fyrr enn tað skal nýtast, og tá viðkomandi ikki skal nýta vápnið meira, at tað verður tikið sundur aftur áðrenn heimferðina.

Sum flutningur er ikki einans at rokna tá vápnið t.d. verður flutt heimanífrá til bátin, men eisini meðan báturin siglir, har tað ikki er loyvt at veiða; har vanlig trygdaratlit tala ímóti, at skot verður latið av, ella í øki, har ætlanin ikki er at veiða.

Til § 11

Stk. 1
Talan er um eina vanliga levnaðartreyt (vandelskrav) til umsøkjaran. Treytin skal tryggja, at bert persónar, ið eru egnaðir at hava vápn fáa loyvi, meðan onnur, ið ikki eiga at hava loyvi til vápn, heldur ikki fáa vápnaloyvi. Tað er tann myndugleikin, ið viðger umsóknina, ið tekur avgerð um, um treytin er lokin.

Levnaðartreytin fylgir eisini almenna hugburðinum, og ringt er tí at seta nøkur beinleiðis kriterier fyri hesum. Tað er tó greitt, at álvarsom lógarbrot føra við sær, at viðkomandi ikki lúkar levnaðartreytina. Í síðsta enda er tað vanligu dómstólarnir, ið taka avgerð um, um treytin er lokin.

Stk. 2
Er umsøkjarin ein løgfrøðiligur persónur, skal tann, ið hevur ábyrgdina, lúka treytirnar. Tað er vanliga dagligi leiðarin ella stjórin, smb. persónarnar í § 8, stk. 3.

Men hini sum starvast hjá løgfrøðiliga persóninum skulu heldur ikki vera nakrir rovnar, ella eisini skal bera til at steingja vápnasølupartin frá.
Hvar skal tað inn?

Stk. 3 - Afturkalling
Mælt verður til at seta hesa áseting inn fyri at hava eina greiða heimild til at afturkalla eitt loyvi, ið eru givin við heimild í lógini ella kunngerðum við heimild í lógini.

Í dag er rættarstøðan, at tað ber til at afturkalla eitt loyvi uttan serliga heimild í lógini, tí at sjálvt um eitt loyvi (avgerð) er givið við heimild í eini lóg, merkir tað ikki, at avgerðin skal standa við til allar tíðir uttan atlit til, hvussu umstøðurnar broytast, loyvishavirin misnýtir loyvi ella nýggjari vitan um fylgurnar av tiknu avgerðini.

Í metingini av, um eitt loyvi kann afturkallast - eftir galdandi reglum – verða serliga 3 atlit tikin:
1. Orsøkin til, at umsitingin afturkallar
2. Týdningin av eini afturkallan fyri borgaran
3. Slag av avgerð (loyvi, forboð, vinnubræv osfr.)

Um so er, at orsøkin er atlit til lív, heilsu og vælferð, trygdina í landinum og at fyribyrgja ófriði, talar tað serliga fyri, at ein avgerð kann afturkallast.

Um so er, at orsøkin er fíggjarligu áhugamál hjá fyrisitingini, til líkheit og beinstevni í umsitingini, vanligan uttanríkispolitik, landslag ella almen sosial áhugamál, er óvist, um ein avgerð kann afturkallast. Í hesum føri hyggja dómstólarnir serliga væl eftir.

Við at hava klára heimild í lógini til at afturkalla, er ætlanin, at dómstólarnir lata umsitingini hava tað rásarumi, sum ein lógarbundin meting vanliga hevur.

Til § 12

Greinin ásetir, hvaðar umsókn skal sendast. Útgangsstøðið er, at umsókn eftir § 1, stk. 1, skal sendast til Føroya Landfúta gjøgnum sýslumann ella politiið, har umsøkjarin býr. Á henda hátt er tað lætt hjá teimum, ið søkja um loyvi. Føroya Landfúti avgerð umsóknir eftir § 1, stk. 1, meðan umsóknir eftir § 1, stk. 2 og stk. 3 verða síðani sendar landstýrismanninum til avgreiðslu saman við einum viðmæli. Fútin hevur viðmælisrætt, tí at hann er sakkønur á vápnaøkinum.

Til § 13

Stk. 1
Tey seinnu árini er tað vorðið alt meira vanligt, at myndugleikar krevja gjald fyri myndugleikaútinnan, t.d. loyvi. Hetta krevur serliga heimild í lóg. Við hesi orðing er ætlanin at fáa til vega neyðuga heimild til at áleggja gjald fyri loyvi. Gjaldið skal avmynda, hvussu nógv tað kostar at fáa til vega eitt loyvi, soleiðis at tað ikki hevur við sær stórar eykaútreiðslur fyri landið.

Stk. 2
Ásett verður, at hevur umsøkjari loyvi frammanundan, verður bert goldið helvtina, tí at arbeiðið at geva loyvi, t.d. metingin av umsøkjaran er munandi minni 2. ferð enn 1. ferð.

Stk. 3
Sambært hesi áseting verður onki gjald álagt teimum, ið verða fevnd av skiftisreglunum. Hetta er gjørt, bæði tí at lutirnir eru útvegaðir, áðrenn tað kravdist loyvi, og fyri at skunda undir, at hesi vápn verða skrásett.

Til § 14

Loyvið verður bert galdandi fyri X ár í senn. Aftan á X ár skal viðkomandi søkja av nýggjum um loyvið. Tað merkir, at treytirnar fyri at fáa loyvið skulu lúkast av nýggjum fyri á henda hátt at tryggja, at umstøðurnar støðugt eru í lagi, og at eitt loyvi ikki verður galdandi óavmarkað, er tað fyrst einaferð fingið til vega. Hetta verður tó ikki galdandi fyri høglbyrsu av umsitingarligum ávum.

Til § 15

Reglan er sett inn fyri at tryggja, at politiið fær kannað, at vápn verða goymd tryggiliga, og at tað ikki verða goymd vápn, ið ikki eru fevnd av loyvinum.

Harumframt krevur tað serliga heimild í lóg at geva politinum atgongd uttan rættarskurð at gera húsakanningar uttan fyri revsirættargangin.

Til § 16

Av tí at Føroya Landfúti ikki er stovnur undir føroyska løgmálaráðnum, men undir danska løgmálaráðnum, sum í sambandi við vápnalóggávuna røkir nakar uppgávur fyri føroyska løgmálaráðið, er neyðugt at hava serliga heimild í lógini um kæru til Løgmálaráðið.

Til § 17

Reglan er tann sama sum í galdandi vápnalógini § 7.

Harumframt er fingin til vega neyðuga heimildin til at revsa løgfrøðiligar persónar, land, kommunu ella kommunalar felagsskapir, ið bróta lógina.

Til § 18

Lógin kemur í gildi 1. januar 2004.

Til § 19

Skiftisregla fyri persónar, sum sambært galdandi vápnalóg lógliga eiga vápn. Vápnaeigarar fáa eitt ár til at fáa viðurskiftini í lagi, soleiðis at teir framhaldandi kunnu eiga vápnini lógliga.

Stk 1
Tey sum í dag lógliga eiga høglbyrsur, skulu framvegis hava møguleika at eiga tær lógliga, um tær verða skrásettar hjá Føroya Landfúta. Við skrásetingini fær eigarin eitt loyvi. Loyvi til høglbyrsur eru ikki tíðaravmarkað, men til ber at missa tey, um okkurt verður, sum ger at tú ikki longur lýkur treytirnar.

Stk 2
Tey sum í dag lógliga eiga innur vápn enn høglbyrsur, skulu fáa møguleika at eiga tey lógliga, um tey søkja um hetta Føroya Landfúta. Umsóknir um framhaldandi at eiga onnur vápn enn høglbyrsur, verða í ítgangsstøðinum viðgjørdar á sama hátt, sum um talan var um at umsøkjarin nústani hevði havt í hyggju at fá sær vápnið. Tað vil siga, at umframt at meta um viðurskiftini hjá umsøkjaranum, fer eisini at verða mett um endamálið hjá umsøkjaranum við framhaldandi at eiga vápnið.

Her kann t.d. vera talan um signalvápn ella brókarbogar.

Mett verður, at talan er um rættiliga fá vápn.